*Magni Arge, formaður í Føroya Oljuídnað leggur frá sær:*

# Rætt at vísa flaggið fyri umheiminum

*Tá føroyskar fyritøkur, stovnar og feløg luttóku á oljumessuni í Aberdeen herfyri varð eisini vitjað á høvuðsstøðini hjá BP og á útgerðarstøðini ASCO í Peterhead. Her fingu føroyingarnir eina fatan av, hvat krevst av ídnaði og tænastuvinnu fyri at vera við*



*Hesi trimtliga og fyrikomandi ansu fólkini tóku ímóti á føroyska básinum. Mynd jan*

Millum luttakararnar á stóru altjóða oljumessuni í Aberdeen herfyri var eisini formaðurin í Føroya Oljuídnaði, Magni Arge.

Umframt at vera við á sjálvum básinum skipaði hann vegna felagið Føroya Oljuídnaður fyri tveimum kunningarferðum fyri føroyingarnar, sum luttóku á messuni. Annar túrurin var til høvuðsstøðina hjá bretska oljufelagnum BP, meðan hin gekk til útgerðarstøðina ASCO í Peterhead.

**Ein partur av einum útvikling!**

Heimafturkomin spurdu vit formannin í Føroya Oljuídnaði, hvat kom burtur úr hesi oljumessuni?

Magni Arge vísir á, at slík luttøka ger ikki tað stóra holið í sjógvin, men hon er so ein partur av tí, sum skal gerast. Tú mást út at vísa flaggið av og á og vísa umverðini, at tú tekur hetta álvorligt, og at tú arbeiðir í felagsskapi og ikki í sjálvdrátti.

-Eg haldi tað var gott at síggja virki, almenna oljuumsiting og oljuráðleggingarnevnd øll savnað á einum stað. Hetta gevur umheiminum eitt signal um, at vit vilja nakað.

**Nógv burtur úr**

Sjálvur heldur Magni Arge, at vitjanin hjá BP og í Peterhead var ófør og sera upplýsandi.

-Eg haldi okkara fólk fingu nógv burtur úr. Hesar vitjanir vóru sera virð ismiklar fyri tey nógvu, sum ikki hava havt samband við eitt oljufelag og eina útgerðarstøð áður.

Hjá BP vórðu føroyingarnir kunnaðir um, hvussu felagið arbeiðir, tá tað snýr seg um innkeyp av vørum til oljuvinnuna, um flutning við flogfari og tyrlu og um sigling til og frá oljupallunum.

Her greiddu umboð fyri tær ýmsu tænasturnar frá, hvussu arbeiði verður lagt til rættis.

Magni Arge heldur, at umframt at fáa innlit í, hvussu arbeitt verður og hvørji krøv verða sett til leverandørarnar, so hevur tað eisini týdning fyri føroyingar at hava útvegað sær persónligt samband við tey fólk, ið standa á odda fyri umrøddu uppgávum.

Vitjað varð so eisini á útgerðarstøðini Asco í Peterhead, sum veitir tænastu til stóran part av oljupallunum í Norðsjónum.

-Hetta haldi eg sjálvur var ein sera áhugaverd og týðandi vitjan, tí har fekst tú avmystifiserað tað, sum hevur við eina oljuútgerðarhavn at gera. Hon líkist jú eini vanligari havn við atløguplássi og goymslubygningum.

Munurin er so bert, at her eru eisini silo'ir at goyma borirunu, verkstaðir o.a. sum burturav eru ætlað oljuvinnuni.

Sosialurin varð eisini við á hesi vitjan og har fingu vit at vita frá leiðsluni, at slík útgerðarhavn kundi eins væl ligið í Føroyum, tá hugsað verður um at veita tænastur til eina komandi oljuvinnu millum Føroyar og Hetland.

-Kynstrið við slíkari supplystøð er at skipa so fyri, at vøran kemur inn og fer avstaðaftur við rúkandi ferð.

**Fer frá**

Magni Arge heldur annars, at alt gekk sum tað átti á sjálvari framsýningini. Honum dámdi væl føroyska básin og ikki minst professionellu tænastuna, sum ungfólkini á básinum veittu øllum teimum vitjandi.

-Men har var eitt, sum eg fylti stá, og tað er skeltið og bumerkið hjá básinum. Eg haldi tað er skeivt at kalla básin "North Atlantic Resource Center". Tað sigur einki í oljuverðini. Har er tað Føroyar, sum eru áhugaverdar. Tað er navnið á landinum sum dregur, tað at tað eru vit, sum eiga rættin til at leita eftir olju og undirgrundina, sum eru áhugaverd. At hon goymir møguligt oljuríkidømi merkir so aftur "bussness", sum er drívmegin undir øllum, og tað, sum fólk hevur áhuga fyri.

Nú hann er komin heim aftur og er farin at halga Atlantsflog alla sína tíð, hevur hann avgjørt at siga seg frá sum formann í Føroya Oljuídnaði.

Hann heldur, at hetta er rætt at gera, nú hann hevur fingið eitt krevjandi nýtt starv. Harafturat heldur hann, at hann hevur tænt sína "vernaplikt" í felagnum og vil nú lata aðrar sleppa framat.

-Tá vit byrjaðu í mai 1993 var alt hetta so nýtt fyri okkum. Tá so frágreiðingin kom frá oljuráðleggingarnevndini og seismisku kanningarnar fóru í gongd, líkasum fingu fólk eina fatan av, hvat hetta snúði seg um.

Magni Arge sigur víðari, at nú er ein enta komin so mikið víðari, at talan er um eini 10 til 20 virki, sum vilja brúka pengar og orku upp á at luttaka á eini oljumessu og vilja vera við til at marknaðarføra seg í felagsskapi.

-Tað er týdningarmikið, eisini tá vit skulu arbeiða uteftir, at vit hava nøkur fólk saman í einum felagsskapi, sum kunnu arbeiða professionelt.

Magni Arge sigur, at nú hetta fyrsta stigið er rokkið og botnurin líkasum lagdur er at fara víðari til næsta stig, og tað er at fáa føroyskar fyritøkur áhugaðar at rigga til til eina komandi oljuvinnu. Tað er hesa uppgávu, sum hann heldur, at onkur annar í Føroya Oljuídnaði nú eigur at taka sær av.

Tá fundur verður aftur í felagnum fer Magni Arge alment at boða frá, at hann fer frá sum formaður.

Í nevndini sita m.a. Johan Mortensen, Árni Joensen og Elias Davidsen.

**jan**



*Kjartan K...sen, stjóri á Menningarstovuni og Magnus Hansen, frá Team 85 her staddir á føroyska básinum. Mynd jan*



*Vitjað verður á ASCO útgerðarhavnini í Peterhead. Kristian Fríðrik Olsen úr Klaksvík tosar við skota. Mynd jan*